Bók um ein fjøltáttaðan listamann

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út megnar verk um Mikkjal Dánjalsson á Ryggi

Tað tók sína tíð, men nú er hon so komin, bókin um Mikkjal Dánjalsson á Ryggi.

Líka síðan 1982 hava teir báðir Jákup Reinert Hansen, prestur á Sandi, og Heini F. Petersen, lærari í Sandoynni, arbeitt við hesum verki. Hetta arbeiði hava teir gjørt í síni frítíð.

Úrslitið er ein bók, sum telur 444 síður, og sum er ein breið lýsing av tí fjøltáttaða listamanninum, ið Mikkjal var.

Hann granskaði, teknaði, málaði og tók myndir, savnaði og skrivaði søgur og frásagnir, yrkti sálmar, sangir og kvæði og gav út fleiri skúlabøkur.

Ein stórur partur av bókini er endurprentaðar fornsøgur, stuttsøgur, greinir og frásagnir, tekstir um landalæru, djór og fuglar, yrkingar, kvæði og sálmar eftir Mikkjal á Ryggi. Men høvundarnir hava eisini funnið fleiri tekstir, ið ongantíð áður hava verið á prenti, m.a. kvæði.

Fuglatekningarnar

Millum tað mest forkunnuga í bókini eru tekningarnar, ið Mikkjal á Ryggi gjørdi av fuglum, og sum hann nýtti í Fuglabókini. Í Fuglabókini, sum kom út í 1951, vóru ikki allar hesar frálíku tekningarnar við, og Mikkjal var sjálvur misnøgdur við, at allar ikki vóru prentaðar í litum og ikki í rættari støddd. Sjálvur hevði han lagt stórt arbeiði í tekningarnar.

- Hevði tú vitað, hvat ómak eg havi gjørt mær av hesum myndum - sitið við fuglinum á bordinum fyri mær, mált longdina á nevi, hálsi, bringu, baki, búki, veli, lørum, beinum og 3 táum, og so breiddina á høvdi, hálsi, kroppi, ofta eisini á nevi og beinum, og so at blanda litirnar, so teir skuldu svara væl til rætta litin,.... men hugtikin av arbeiðinum gavst eg ikki, fyrr enn tað var gott. - Skal tað nú ikki koma fram í góðum prenti, so má eg siga, at óhent havi eg spilt mína tíð.

Soleiðis skrivaði Mikkjal á Ryggi í 1950 til Christian Matras, sum hevði við útgávuna av Fuglabókini at gera.

Christian Matras svaraði aftur, at myndirnar ikki vórðu gjørdar til einkis. Myndirnar eru ein minnisvarði, skrivaði hann.

Í Mikkjalsbók, sum henda bókin um Mikkjal á Ryggi eitur, kemur væl fram, hvussu stórt arbeiði listamaðurin og granskaði legði í hesar myndirnar. Og allar eru tær prentaðar í litum.

Leingi visti eingin, hvar upprunatekningarnar vóru blivnar av. Ikki fyrr enn í seinnu hevt av áttatiárunum kom Heini F. Petersen í talu við ein skyldmann hjá Mikkjali, og hesin visti at siga, at tær lógu í einum kufferti, sum var sent vestur av sanatoriinum í Hoydølum, har Mikkjal á Ryggi doyði av tuberklum í 1956. Aftan á deyða Mikkjals og sett til viks. Myndirnar lógu saman við øðrum tilfari, sum eisini er prentað fyrstu ferð í Mikkjalsbók.

Í 1979 var ein kvøldseta á Giljanesi á 100 ára degnum hjá Mikkjali á Ryggi. Heini F. Petersen var ein teirra, sum skipaði fyri kvøldsetuni, og tað var orsøkin til, at hann varð biðin um at leggja Mikkjalsbók til rættis saman við Jákupi Reinert Hansen, sum við lærda háskúlan í Århus skrivaði høvuðsuppgávu um Mikkjal á Ryggi.


Sjáldsamur maður

Fremst í bókini er ein lýsing, sum D. P. Danielsen gjørdi um farbróðurin. Henda lýsing er í sær sjálvum eitt listaverk, og vit fáa at vita, hvussu fjølbroyttur Mikkjal var. Samtíðin hevði ilt við at skilja henda mann, sum tímdi betur at granska og skriva heldur enn at gera vanligt arbeiði, men sum dugdi so væl at fáa skaldskapin og gerandisdagin til at renna saman í eina livandi mynd, sum D. P. Danielsen skrivaði.

Samstundis sum Mikkjal á Ryggi fekst við at lýsa tað tímiliga var hann eisini sálmaskald. Hann gjørdi nógvar vakrar og góðar



Tey trý hava lagt stórt arbeiði í at fáa hetta stóra verkið um Mikkjal á Ryggi út, høvundarnir báðir Jákup Reinert Hansen og Heini F. Petersen og Ingrid Sondum á Bókadeild Føroya Lærarafelags



Mikkjal teknaðit fuglarnar í fullari støddd. Við hvørja tekning hevur hann skrivað mátini á fuglinum, ið hann hevði frammanfyri sær, tá hann teknaði

Hesa myndina og mangar aðrar tók Johan Elias Mikkelsen av Mikkjali.er málar hann fuglar

